**Skúlastýrisfundur**

Dagfesting: 15.01.2020

Kl: 16:00–17:30

Til staðar: Nelly Haakonardóttir Debes, Marjun Danielsen, Ragnar Isaksen, Vivi Davidsen, Turið G. Hansen og Høgni Warberg.

Skrá

1. Status viðvíkjandi fimleikarhøllini

2. Status viðvíkjandi uppvørpa og lørift

3.Status viðvíkjandi reiggjum

4. Status viðvíkjandi matpakkin.fo

5. Starvsfólkadagur/fundur

6. Ymiskt

Att 1: Heini Holm er í hesum døgum í gongd við at mála veggirnar í fimleikarhøllini, og hann væntar at verða liðugur við sítt arbeiði einaferð mitt í komandi viku. Tá verður farið í gongd við at slípa og arbeiða uppá gólvið, og tað arbeiði tekur væntandi umleið 1 viku. Vit gingu ein túr yvir til fimleikarhøllina at fregnast, og vit sóu m.a. at í øllum vindeygunum vórðu rútarnir skiftir. Vit vóru samd um, at hetta arbeiði skuldi langt síðan verið gjørt, og at tað helst skuldið verið gjørt í feriutíð, men betur seint enn ongantíð😊...

Att 2: Løriftið er komið upp, eins og teir fýra hátalararnir. Heilt skjótt kemur uppvørpan upp, og tá alt er sett upp, fara lærararnir at fáa upplæring í, hvussu útgerðin verður nýtt.

Att 3. Vit umrøddu status viðvíkjandi ynskinum um at fáa fleiri reiggjur til skúlagarðin. Avtalað varð, at Ragnar og Vivi fara at fáa hetta málið viðgjørt í kommununi, har tað verður

tikin endalig støða. Eftirfylgjandi boða Ragnar og Vivi skúlastýrinum frá, hvør endaliga niðurstøðan verður. Er/verður tilboðið um reiggjur frá Prull játtað, og hvør skal taka sær av arbeiðnum at seta upp reiggjurnar.

Att 4: Høgni og Turið greiddu frá trupulleikunum í samband við tænastuveitingina frá matpakkin.fo. Mangan hava næmingarnir fingið annan matpakka, enn tann teir hava bílagt, umframt at góðskan av matvørunum fleiri ferðir ala ikki hevur verið nøktandi, har t.d. grønmeti als ikki hevur verið frískt og etandi. Høgni hevur fleiri ferðir við telduposti gjørt vart við trupulleikarnar, og frá matpakkin.fo hava tey lova góðan bata. Vit eftirmeta støðuna á komandi skúlastýrisfundi.

Att: 5: Tosað varð um at hava ein møguliga starvsfólkadag/fund einaferð í ár. Ongin niðurstøða var tikin hesum viðvíkjandi, og støða verður tikin til hetta seinni.

Att 6: Vit tosaðu um gøtuna frá skúlanum og oman á Eystaru hellu, at har er ótrygt at ganga, tí hon kann verða sera hál, har vandi kann verða fyri, at børn fara á glið og enda heilt niðri í ánni. Skúlastýrið avgjørdi tí at orða og senda eitt skriv til kommununa, har vit heita á tey um at gera ábøtur til hesa gøtuna, sum kann tryggja, at børnini kunna ganga trygt har.

Vit umrøddu tað tvístøðu, sum skúlin av og á kemur í um veturin, tá ‘stormar leika í’. Skal ella skal ikki skúladagurin avlýsast? Her má eisini takast atlit til, at fimm av teimum seks lærararunum í Kvívíkar skúla, koma koyrandi til arbeiðis frá øðrum bygdum og býum...

Vit hava skúlastýrisfund aftur mikudagin 11. mars kl. 16, síðan mikudagin 13. Mai kl. 16 og garðdagur verður í viku 25.